# Banna ljósperur við gløðitráði

Nógv fáa trupulleikar eftir 1. September, tá handlar í ES-londunum ikki longur hava lov at selja kámar ljósperur við gløðitráði. Tí spariperur kunnu ikki brúkast til ljósdemparar og skyntól, ið tendra ljóisð, tá rørsla er. Kámu ljósperurnar við gløðitráði brúka ov nógva orku og tí hevur ES gjørt av at banna slíkar perur. Krøvini til halogenperur verða eisini skerpað.



# Brek á Húsareyni

Høvuðssendarin á Húsareyni virkar ikki í løtuni, og tí hoyrist útvarpið ikki á FM í stórum pørtum av landinum. Nakrir fáir sendarar hava linjusamaband. Eitt nú FM 96.5, sum hoyrist í høvuðsstaðnum. Eisini hoyrist útvarpið á millumbylgju og á heimasíðuni hjá Kringvarpinum. Fólk frá Føroya Tele eru í ferð við at umvæla brekið.

## Hvør heldur dregginum longst?

**Ein av teimum mest krevjandi kappingunum á Føroya Sjómannadegi er føroyameistarakappingin at halda dregg**



TÍÐINDASKRIV

Kappingin snýr seg um við báðum ørmum strektum at halda einum dreggi so leingi sum møguligt. Tann sum heldur dregginum longst hevur vunnið kappingina.

Tað sær ikki torført út, men tá ein lítil løta er fráliðin, so byrjar møðin at vísa seg og spurningurin um styrki og áhaldni kemur inn.

Hetta sást eisini í fjør, tá fleiri máttu gevast áðrenn tveir minuttir vóru gingnir. Tó vóru nakrir sum hildu á til væl yvir tveir minuttir. Tá umleið tveir og ein hálvur minuttir vóru gingnir stóðu tveir persónar eftir.

Endaliga úrslitið gjørdist, at Bjørn Kallsoy vann k appingina við at halda dregginum longst. Næstur honum kom Jákup Jacobsen, hvørs styrki gekk undan áðrenn sterki Bjørn Kallsoy, kundi lyfta hendurnar í sigri.

Spennandi verður at vita, um vinnarin frá í fjør aftur fer at dystast í ár.

Hendan kappingin hevur havt mangan sterkan mann á palli. Eitt nú hevur Karstin Hansen, fyrrverandi figgjarmálaráðharri, staðið sum sigursharri í hesi kapping, eins og Óli Skarðenni vant úr mótstøðumonnunum fyri nøkrum árum síðan.

# Føroya kvikasti agnskeri

**Í fjør var sera stórur spenningar var í kappingini at skera agn. Einans fá sekundum vóru millum teir kvikastu við knívunum. Roknað verður við, at luttakararnir aftur í ár fara at verða títtir við knívunum.**



TÍÐINDASKRIV

Kappingin í at skera agn er eisini millum siðvandu kappingarnar á Føroya Sjómannadegi. Í umhvørvinum har húkur og agn verða nýtt sum veiðireiðskapur, hevur ofta verið tosað um tær góðu dygdirnar at vera ein kvikur og góður agnaskeri. Ikki frítt at ein avís kapping altíð hevur ligið í hesum yrki. Ikki minst í Klaksvík, sum vertur fyri Føroya Sjómannadagar, hevur altíð verið ein ávís kapping í hesum yrkinum.

Mong minnast, hvussu kvikur, eitt nú Perry Poulsen, sum í nøkur ár var heimamaður hjá Bjørgvin, var. Auðunn Konráðsson og Ansvein Sigurðsson eru eisini millum gitnar angskerar í Klaksvík - hetta bert fyri at nevna nakrar heilt fáar.

Í fjør var rættiligur spenningur millum luttakararnar í kappingini at skera agn. Munurin millum tann skjótasta og tenn seinasta var einans nøkur heilt fáa sekund. Spenningurin var eisini sera høgur, tá lagt var til brats. Knívarnir vóru títtir og teir 50 sildafiskarnir vóru kvikliga førdir undir knívin.

Í ár verður hendan kappingin sjálvandi aftur á skránni, og spennandi verður at vita, hvussu leikur fer.

## Havdjór verða sýnd fram

**Aftur í ár verður skipað fyri framsýning av ymiskum sløgum av havdjórum á Føroya Sjómannadegi**

TÍÐINDASKRIV

Fyrireikingarnar eru í gongd til at taka ímóti gestum á Føroya Sjómannadegi, sum verður 22. August í Klaksvík. Eitt nú eru kørini komin upp og fiskar eru í nøkrum av teimum.

Fiskakørini eru vanliga eitt av teimum vælumtóktu tiltøkunum á sjómannadeginum. Kørini plaga at standa norðuri á Stongunum við egningaskúrarnar og hevur mong ein forvitin og barnslig sál havt gleði av hesi framsýning.

Enn eru ikki øll kørini fylt við havdjórum, men komandi dagarnar verða alsamt fleiri fiskasløg og botndjór í siggja í teimum.

Tað eru ymiskir bátar sum fáa tey ymisku fiskasløgini, sum taka tey við til lands og lata Sjómannadegum tey. Fyrireikarnir eru sera glaðir fyri hesa hjálp, sum ger tað møguligt at hava framsýningina.

# Vápnað 10 útróðrarbátar við 130 vatnkanónum

**Fiskikappingin, útkasting av fløskuposti og stóra vatnkríggi á Vánni, sum lýst var at verða mikukvøldið er útsett til fríggjadagin klokkan 18.**

TÍÐINDASKRIV

Av ymiskum orðsøkum er Fiskikappingin, sum lýst var at verða á Kósbrúnni mikukvøldið útsett til fríggjakvøldið klokkan 18.

Til ber at melda til kappingina í deildini hjá EIK í Klaksvík fram til fríggjadagin klokkan 16.

Seðil til fløskupostarnar kann avheintast á deildini hjá EIK í Klaksvík fram til klokkan 16 fríggjadagin. Fløskur til fløskupostarnar verða handaðir á bryggjuni í samband við Fiskikappingina.

Eftir fiskikappingina verður farið út í Kalsoyarfjørð við útróðrarbátum har fløskupostarnir verða kastaðir.

Síðani verður silgt inn á Vánna og útfyri Stangabrúnni verður síðani stórt sjórænarakríggj við vatnkanónum.

Til endamálið hevur Føroya Sjómannadagur rigga 130 sergjørdar spulislangur/vatnkanónir til - umborð á 10 útróðrarbátum - sum sostatt eru vápnaðir til kríggj.

Til Fiskikappingina skulu børn sjálvi hava tráðu og bjargingarvest.

Fyri at koma umborð á útróðrarbátarnar er bjargingarvestar eitt krav.

Í samband við vatnkríggi er ynskiligt at børnini eru í regnklæðum.

Ynskiligt er at so mong sum gjørligt verða smikaði ella ílætin sjórænaraklæðir.

